# Skattalækking

**Annfinn Brekkstein**
*valevni sambandsflokksins í Suðurstreymoy*

Í einum ásannan av hesum veruleika vil undirritaði sum valevni sambandsflokksins stríðast fyri at minka um almenna partin av samfelagsbúskapinum. Í hesi stremban er og verður eitt av aðalmálum floksins at minka um tað alt og høga skatta- og avgjaldstrýstið, sum er galdandi í føroyska samfelagnum.

Tað er okkum til títlan sóma at varðveita ein marginalskatt uppá 58% av seinast forvunnu upphæddini fyri vanligar meðalinntøkur, umframt at meirvirðisgjaldið er tað hægsta í Europa ájavnt tað danska og svenska.

Tað skal altíð loysa seg at arbeiða. Borgarin skal sostatt ongantíð revsast fíggjarliga fyri sín góða arbeishug. Fyri at stimbra og motivera tann einstaka eigur øll orka eitt komandi valskeið at vera løgd í at fáa skattin niður um 50% seinast tjentu krónuni.

# Sjálvstýrið ikki útsett!

**Høgni Mikkelsen,**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreym*



Á forsíðini í Sosialinum nr. 57 er við stórum stavum skrivað: “Sjálvstýrið útsett næstu fýra árini”. Sosialurin skrivar, at hetta eru boðini frá valskrá Fólkafloksins. Hesi boð Fólkafloksins samsvara eisini væl við greinina hjá Leilu Hjørleivsdóttir á Lofti. Hon skrivar nevnliga í sama Sosiali við hesi yvirskrift: “Troytt av sjálvstýristosinum” og undiryvirskriftin sigur : “Men tú kanst velja at fáa doyvara settan á, meðan vit bíða”

Fólkaflokkurin kann hava rætt so langt, at tosið hjá loysingaflokkunum um meira sjálvstýri, sum nú hevur vart i 54 ár, er møðandi, og serliga tá hugsað verður um avrikini av hesum drúgva tosi.

Men vit í Sambandsflokkinum hava ongar ætlanir um at útseta strembanina um meira sjálvstýri. Vit hava heldur ongar ætlanir um at møða nakran við tómum tosi, men heldur gera nakað í verki.

“Nýggjar tíðir” sum er uppskot Sambandsfloksins til nýskipan av viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark, hevur ongar forðingar fyri at menna okkara sjálvstýri, sjálvbjargni og frælsi.

Vit kenna okkum sannførdar um, at okkara uppskot er júst tað, sum 75 % av føroyingum hava víst á. Ein skipan innanfyri ríkisfelagsskapin, sum gevur okkum munin meira sjálvstýri, sjálvbjargni og frælsi enn loysingin nakrantíð ferð at geva.

Fólkaflokkurin hevur sostatt ikki fyri neyðuni, at bíða í fýra ár. Saman við okkum røkka tit málið innan fýra ár..

# Mentan og list - ein stoltleiki hjá føroyingum

**Annika Olsen,**
*valevni fólkafloksins í Suðurstreymi*



Føroyar eiga eitt sermerkt menta- og listafólk, líka frá føroyskum bóklistafólkið, myndlistafólkið til ta føroysku kvæðamentanina. Mong føroysk listafólk hava fingið heiðurliga altjóða viðurkenning eitt nú William Heinesen og nú Jóanis Nielsen. Tað sermerkta við tí skapandi listini er, at hon ofta gongur á odda fyri tí samfelagsliga rákinum. Mong siga seg ikki skilja listina, yrkingar eru torførir at skilja, og myndlistin er tað hvørki høvd ella hali á. Tað er netupp hetta óskiljiliga og tørføra, ið er tað nýskapandi og framskygda við listini. Vit skilja hana kanska ikki í løtuni, men um nøkur ár kunnu vit siga á ja, tað var júst sum hasin listamaðurin ella handan listakvinnan segði fyri tíð síðani. Eitt dømi um, hvussu framskygd listin er, er bókin hjá Jules Verne ”En verdensomsejling under havet”. Hendan sigling var við kavbati, og sum vit vita, so var kavbáturin ikki uppfunnin, tá ið Jules Verne skrivaði bókina. Fólk tá í tíðini hildu, at han var svakur at skriva um kavbátar og um menniskju, ið kundu ferðast undir vatni. Men sum tíðin leið, bleiv kavbáturin ein veruleiki. Tað er neyðugt, at vit ikki bremsa listini, men ístaðin stuðla ta framskygdu listina.

Tvey onnur hugtøk, ið sermerkja listina og mentanina er filosofi og visión. Tað er eyðkent, at listafólk hava eina filosofiska hugsan, sum tey lata til kennar i teirra verkum. Tíverri verður ofta tað filosofiska grundarlagið í okkara mentan og list burturgloymt í øllum tí nýmótans meldrinum við millum annað digitalmiðlunum. Eg haldi, at vit øll eiga at stuðla mentanini og tí skapandi listini, tí tað gevur okkum livsmót, gleði og ikki minst visiónir um framtíðina. Mentanin og tann skapandi listin kann vekja okkara filosofiska og visionera hugsunarhátt. Visiónur kunnu koma okkum øllum til góðar ikki minst okkum politikarum, sum skulu hava visiónir um framtíðina.

Umframt hetta so er mentan og list ofta tann besti ambassadørurin fyri Føroyar úteftir og ger tað, at nógv ferðafólk hava hug at koma henda vegin. Tann skapandi listin kann eisini vera ein avbera góð útflutningsvøra, sum bæði kann geva eitt fíggjarligt avkast og eina góða reklamu fyri Føroyar. Franski mentamálaráðharrin Jacques Lang segði millum annað, at fyri hvønn frank, tú leggur sum íløgu til mentan og list, vilt tú fáa 4-5 faldaðan aftur.

Sum valevni fyri Fólkaflokkin i Suðurstreymi vil eg arbeiða fyri, at listafólkini, sum eru Føroya stoltleiki, fáa bestu karmar og viðurskifti at arbeiða undir, tí tey hava alstóran týdning fyri okkara vinnulív, okkara búskap og ikki minst okkara visiónir um framtíðina.

http://www.annikaolsen.net

# Trygt vinnulív gevur trygga framtíð

**Heðin Zachariasen**
*valevni Fólkafloksins í Norðurstreymi*



Vinnan skal hava tryggar karmar at virka undir, soleiðis at vit skapa áhuga fyri, at kvinnur og menn fáa hug og áræði at stovnseta egið virki.

Hví skulu vit hava ein tílíkan politikk, kunnu vit spyrja. Jú, fyri at skapa arbeiðspláss so at øll kunnu hava arbeiði og trívast. Tá vita tey, at samfelagið hevur brúk fyri teimum og okkum øllum.

Tað verður eisini lættari at reka samfelagið, tí tá fleiri eru at gjalda – bíligari verður tað fyri hvønn okkara. Eisini fyri at gera tað lættari at hjálpa teimum, sum av sjúku ella øðrum orsøkum ikki klára at vinna til dagin og vegin. Hesi fólk skulu hava eina virðiliga tilveru, tað er okkara ábyrgd, at so er.

Ofta verður ført fram, at tað bert eru arbeiðsgevararnir, sum fáa ágóðan av at stovnseta egið virki. Sjálvsagt vil ein og hvør, sum byrjar egið virkið vinna pening. Men í flestu førum hevur virkið eisini brúk fyri arbeiðsfólki. Og tað er heilt greitt, at ein arbeiðsgevari við ongum arbeiðsfólki vinnur ongan pening og arbeiðsfólk við ongum arbeiðsgevara vinnur ongan pening. Tí eiga vit at standa saman sum ein maður, eisini tá um vinnlívið ræður. Tí sum orðatakið sigur, hvør av øðrum liva má.

Latið okkum tí standa saman sum ein maður um arbeiðsfólki og arbeiðsgevaran. Tað gevur eitt sterkt vinnulív. Sterkt vinnulív gevur eitt sterkt samfelag og eitt sterkt samfelag gevur okkum eitt gott land at arbeiða og búgva í.

Hetta er nakað tú ført við at velja Fólkaflokkin lista A.

# Andrea fekk premiu í Steinway-kapping

**Teir tríggir føroysku musikkskúlanæmingarnir, sum vóru við klaverkapping hjá Steinway í Keypmannahavn kláraðu seg sera væl. Ein teirra, Andrea á Dul Mortensen fekk premiu fyri framførslu av nýggjum tónleiki**

STEINWAY-KAPPING
*Eirikur Lindenskov*

Sjeynda árið á rað hava føroyski musikkskúlanæmingar tikið lut í Steinway klaverkapping í Danmark. Tað er Tórshavnar Musikkskúli, sum skipar fyri innleiðandi kappingunum í Føroyum.

Í ár var innleiðandi kappingin í Føroyum skipað sum ein »pianofestivalur« vikuskiftið 1. til 3. februar. Tórshavnar Musikkskúli bjóðaði øllum musikkskúlunum í landinum at vera við.

Sum gestalærari á skeiðnum var Amalie Malling, sum undirvísi í klaverspæli á Kongiliga Musikkonservatoriinum í Keypmannahavn. Pianofestivalurin – ella skeiðið – endaði so við eini kapping sunnudagin 3. februar, at tey trý, sum skuldu umboða Føroyar í kappingini í Danmark, skuldu kjósast.

Kappingin er skipað í trimum bólkum, ein fyri næmingar undir 11 ár, ein fyri næmingar 12-15 ár og ein fyri næmingar 16-19 ár. Tey, ið vunnu kappingina í Føroyum og sluppu til Danmarkar vóru:

Jórun Hansen, Skipanes 11 ár, Hilmar Kass Jacobsen, Havn, 13 ár, Andrea á Dul Mortensen, Havn 19 ár

– Øll trý kláraðu seg sera væl í kappingini í Danmark, sigur Napoleon Nólsoy, leiðari á Tórshavnar Musikkskúla, sum saman við foreldrum, lærarum og Jákupi Simonsen frá mentanardeildini hjá Tórshavnar Býráð var við til kappingina, sum var hildin í konsertsalinum í Lousianasavninum.

Andrea á Dul Mortensen fekk premiu fyri tann best spælda nýggjari tónleikin, og hósdagin fekk Tórshavnar Musikkskúli eisini boð um, at Andrea, sum premiuvinnari í tí »XVI Danske Steinway Piano Festival«, sleppur við til ein Master Class við kenda svenska klaverleikaranum, Hans Pålsson, professara. Hesin »Master Class« verður leygardagin 5. oktober í ár í Steinway Kammersal í Keypmannahavn.

Napoleon Nólsoy er sera fegin um umstøðurnar hjá Tórshavnar Musikkskúla á hesum øki. Hann sigur, at skúlin eigur tvey Steinway flygil, og hann fegnast eisini um positiva hugburðin hjá Tórshavnar Býráð.



*11 ára gamla Jórun Hansen av Skipanesi, 19 ára gamla Andrea á Dul Mortensen og 13 ára gamli Hilmar Kass Jacobsen umboðaðu Føroyar í donsku Steinway kappingini*



VIÐMERKINGAR

# Um at hava oyra fyri tvørsøgnum

**Sveinur Ísheim Tummasson**



Mangur góður maður hevur til fánýtis roynt at skilja hugsjónarligu tvørsagnirnar í einum tí týdningarmesta politiska flokkinum í Føroyum, nevniliga javnaðarflokkinum. Sum borgari er nevniliga ilt at skilja, hvat hesin flokkur veruliga vil. Lutverkið hjá Føroya Javnaðarflokki í føroyskum politikki minnir um lutverkið hjá Lokka í norrønari guðalæru, og óivað er tað so, at flokkurin er eins og ein grá leið í politisku tilvitan føroyinga. Men summi menniskju eru soleiðis, at tey lata seg draga at tí gráa og gátuføra og síggja tvørsagnir sum tekin um stórleika. Her skulu umrøðast tær tríggjar tvørsagnirnar í javnaðarflokkinum, men søguligi karmurin um viðgerðina átti eisini at fingið hinar flokkarnar at hugsað seg um.

Tann elsti stovnurin í politisku skipan okkara er innburðarrætturin - tín og mín. Hann er kjarnin í borgaraskapi okkara, sum tí er elligamal og gongur aftur í landnámstíð; men viðurskiftini millum borgara og myndugleika eru sera nógv broytt – serstakliga seinastu 152 árini.

Nútíðargerðin ber í sær ymsar politiskar hugsjónir og stevnur. Summar teirra hava víst seg at eiga ta kraft, ið skal til at skapa hóprørslur. Tríggjar hóprørslur, ið hava verið við til at mynda nútíðargerðina víða hvar, eru: Fólkaræðishugsjónin, tjóðskaparhugsjónin og arbeiðararørslan.

Tað er nú so, at politiskar hugsjónir hava allar eitthvørt dreymakent við sær, sum ikki ber til at fremja í verki; men hesar tríggjar nevndu hóprørslur hava fingið ítøkiligar avleiðingar fyri stjórnarlag og politiska lívið í øllum framkomnum samfeløgum.

**Fólkaræði.**

Fólkaræðishugsjónin er farin sína sigursgongd um allan heim seinastu 200 árini. Hvussu lívsseig henda hugsjón er, sóu vit, tá ið fólkini í Eystur Evropu settu seg upp ímóti stjórnarvaldinum. Men fólkaræði er ikki bara spurningur um at broyta myndugleikastovnarnar, so at teir virka sínámillum í samsvari við fólkaræðishugsjónina.

Tað tekur drúgva tíð at menna politisku mentanina í einum samfelag, so at flestallir samfelagsborgarar eru førir fyri at taka á seg ta stóru ábyrgd, sum tað er at taka lut í eini fólkaræðisskipan. Tað krevur ein serstakan fólkaræðisligan hugburð, sum alsamt verður hildin uppi og styrktur. Um hugt verður at mentanararvi okkara, eru føroyingar ikki verri fyri enn so mong onnur – heldur betur - men politiska mentanin og søguliga og demokratiska tilvitanin eru á alt ov lágum stigi. Hetta er tíverri ikki av tilvild, heldur er tað avleiðingin av miðvísari villleiðing av fleiri ættarliðum av føroyingum.

Kjarnin í fólkaræðinum er almenni valrætturin, sum byggir júst á ta sannføring, at borgarin sjálvur dugir á at skyna. At hann dugir at velja við skili, og skilja tað, hann hevur valt! Valrættur borgarans eigur í prinsippinum at fevna um øll samfelagsmál á einum avmarkaðum landafrøðiligum øki. Men júst um henda spurning stendur mangan hart stríð, tí hvør hevur borgararætt, og hvussu skal rætta landafrøðiliga økið avmarkast?

Í Føroyum er eingin ivi um, hvussu ein demokratisk skipan skal avmarkast: tann gamli føroyski borgararætturin eigur at geva almennan valrætt til Føroya Løgting, sum skal verða tann stovnur, ið smíðar lógir út at 200 fjórðinga marki. Og sjálvsagt eiga at vera reglur um, hvussu onnur kunnu fáa føroyskan borgararætt. Á hesum grundarlagi eiga sáttmálar at verða gjørdir við onnur lond, sum avmarka sjálvræðið á ávísum økjum, har tað er neyðugt til tess at taka lut í vaksandi samstarvinum í heiminum.

Sjáldan er so stór fløkja komin í so einfalt mál sum demokratiseringina av Føroyum. Tí enn í hesum Harrans ári 2002 er vald Føroya Løgtings avmarkað av elligomlum kongsvaldi, sum liggur í Keypmannahavn, har tað í veruleikanum er endað í hondunum á tjóðskaparsinnaðum, donskum stjórnmálamonnum og embætismonnum.

Einstaklingar her á landi hava verið tilvitaðir um demokratiseringina í ávísum tíðarbilum og hava framt tiltøk, sum hava fingið stóra undirtøku; men vit hava ongantíð havt eina demokratirørslu í Føroyum, sum var nóg sterk til at fáa alt vald aftur til fólksins. Tey demokratisku framstig, sum hend eru, eru sett í verk av einaveldisstjórnini í Keypmannahavn sum ein avleiðing av donsku demokratiseringstilgongdini og við tí endamáli at forða fyri veruligari demokratisering í Føroyum.

Føroya Javnaðarflokkur sigur seg vera ein demokratiskan flokk; men ábyrgdin av, at hetta einfalda mál er so illa fløkt, liggur tung á júst hesum flokki. At javnaðarflokkurin er sloppin so lættliga og hevur staðið seg so væl, er óivað fremsta dømið um, hvussu stutt á leið politiska mentanin í Føroyum er komin.

Hetta er tann fyrsta tvørsøgnin hjá Føroya Javnaðarflokki: Hvussu kann ein demokratiskur flokkur verja demokratiska undirskotið í Føroyum?

**Tjóðskaparrørslan.**

Rembingarnar í eittnú Baltalondum sýna okkum, hvussu sterkur máttur býr í tjóðskaparrørsluni, og henda hóprørsla verður nevnd sum høvuðsorsøkin til, at risaveldið USSR fell. Tjóðskaparrørslan hevur tvær síður - eina ljósa og eina døkka. Føroyingar kenna báðar hesar síður, og stríðið millum teirra stendur enn.

Danska demokratiseringin slepti sterkum tjóðskaparkenslum leysum har á landi. Felags myndugleikarnir hjá ríkjafelagsskapinum gjørdust brátt amboð í hondunum á donsku tjóðskaparrørsluni: Ríkjafelagsskapurin skuldi nú gerast til ríkið hjá donsku tjóðini. Danska tjóðskaparrørslan gjørdist so ágangandi, at hon kúgaði rættindini hjá m.ø. føroyingum og breyt demokratiskar grundreglur. Danskir heiðursmenn sum N.F.S. Grundtvig og A.S. Ørsted mótmæltu við nýtum orðum hesi gongd, og tað var helst bara teimum fyri at takka, at danska tjóðskaparstjórnin ikki innlimaði Føroyar í danska ríkið formliga, men heldur setti sonevndu »grundlógina« í verk sambært gomlu løggávuni, t.e. við kongaligari fyriskipan. Men demokrati fingu føroyingar ikki!

Nú er tað so, at ein fólkaræðisskipan hevur ikki sum treyt, at eindin skal vera ein tjóð. Men tað er so sanniliga eingin forðing fyri at seta á stovn fólkaræði, at eindin er ein tjóð. Tvørturímóti. Og hóast føroyingar flestir hava verið glaðir um øll demokratisk framstig, sum hend eru, so var tjóðskaparrørslan føroyska ein greið ábending um, at føroyingar vóru ónøgdir við ágangin frá donsku tjóðskaparrørsluni, sum var farin so langt, at mál og mentan okkara vóru hótt. Danski tjóðskaparpolitikkurin var um at troka føroysku samfelagsmenningina heilt av leið.

Tjóðskaparrørslan kom í tøkum tíma, og síðani hava bestu kvinnur og menn í Føroyum sagt seg taka undir við tí vøkru hugsan at standa saman til tess at fáa føroyingar at ganga fram í øllum lutum.

Føroyingar eru ein tjóð – hvussu tað enn verður vent og snarað: Í týskari og franskari merking av orðinum tjóð og sambært altjóðarrætti. Vit hava okkara egna statsrætt og ríkisborgararætt, sum er sínámillum javnsettur við danska ríkisborgararættin. Land okkara er greitt avmarkað í mun til grannalondini. Her er bara eitt fólk, ein tjóð. Sum eitt hitt ríkasta landið í heimi fara vit ikki at liggja altjóða samfelagnum til byrði, og vit eru eingin hóttan móti nøkrum, vit fáast ikki við politiskan yvirgang og harðskap.

Dagsins veruleiki er nú so, at berandi eindin í altjóðasamfelagnum er ríkið. Føroyar eru eitt ríki og ein tjóð – men hava ikki demokrati. Javnaðarflokkurin kann væl vera demokratiskur flokkur, tó at hann er ímóti føroyskum fólkaræði. Men sum heimurin sær út í dag, verður hann at taka støðu fyri onkrum øðrum tjóðskapi. T.d. ber til at siga, sum er, at hann stríðist fyri einari demokratiskari innliman í donsku demokratisku skipanina – møguliga við onkrari minnilutaskipan – men tað er ikki hetta, sum Javnaðarflokkurin sigur seg berjast fyri. Orsøkin til, at javnaðarflokkurin ikki bara tónar reint Dannebrogsflagg á hesum øki, er óivað tí, at leiðslan veit, at so missa teir allar atkvøðurnar – uttan tær í Mjørkadali.

Tó má sigast, at javnaðarflokkurin ongantíð hevur verið so opin um sín danskleika sum undir núverandi formanni. Vert er at minnast, at Petur Mohr Dam tók fyrivarni mótvegis gildi donsku grundlógarinnar, tá ið samráðingar vóru millum løgtingsnevnd og stjórnina í Keypmannahavn 1946-47. Men núverandi formaður førir fram, at danska grundlógin er eisini donsk grundlóg í Føroyum, tó at hon í veruleikanum bara er vesturnorsk einaveldislóg, sum demokratiserar úrvald samfelagsøki á kommunalum stigi. Tíverri standa hesi ósannindi, sum ganga út frá danska forsætisráðnum, so sterk, at eisini víðgongdir sjálvstýrismenn føra tey fram.

Men her liggur nú onnur tvørsøgnin, sum javnaðarflokkurin hevur at dragast við: Flokkurin talar mest um alheimssamstarv, og at tjóðin sum hugtak hevur lítlan týdning – uttan sum sjálvsagt mentanarfyribrigdi. Hví nýtir hesin flokkur tá alla orku sína til at varðveita valdið hjá einari fremmandari tjóð í Føroyum?

**Arbeiðararørslan.**

Tá ið arbeiðarrørslan verður viðgjørd í føroyskum høpi, hugsa fólk vanliga um Tvøroyri, at tað var har, hon kom upp og tí enn hevur sína høvuðsborg. Men so einfaldur er veruleikin ikki. Havnin hevði sína sosialistisku rørslu ein mansaldur, áðrenn hon kom fyri seg á Tvøroyri.

Tey fækka, sum vita at siga frá innanhýsis stríðnum í arbeiðararørsluni í Føroyum og javnaðarflokkinum, sum stóð millum føroyskar sosialistar og teir donsku sosialdemokratarnar. Stríðið var sera hart, og tað var stundum um reppið, at føroysku sosialistarnir í Havn og Klaksvík yvirtóku javnaðarflokkin – og tað hevði verið týdningarmesta yvirtøkan undir heimastýrinum.

Ein hin størsti sigur, ið føroyska arbeiðararørslan vann, var tá ið tað eydnaðist at steðga sosialdemokratisku ætlanunum at innlima Føroya Arbeiðarafelag í donsku arbeiðararørsluna í 50-árunum. Hevði tað eydnast teimum, hevði føroyski arbeiðsmarknaðurin og samfelagið alt uttan iva verðið integrerað og assimilerað við danska samfelagið á ein hátt, sum vit valla duga at ímynda okkum. Men yvirhøvur megnaðu føroysku sosialistarnir ikki at standa ímóti vælsmurda ághtinginum frá danskt stýrdu sosialdemokratunum.

Ein tann fínasti umboðsmaðurin fyri hesa føroysku sosialismu var Hans Andrias í Áarstovu. Trongskygdir tjóðskaparmenn og dansktsinnaðir sosialdemokratar tykjast fullsamdir um at gera hann til nationalromantikara – og einki annað. Men tað er tí, at báðir ræðast ta sterku føroysku sosialismu, sum Hans Andrias stóð fyri, og sum er tann politiska hugsjón í Føroyum, sum hevur størsta intellektuella og politiska potentialið – men sum ikki er umboðað í illa slitnu flokkaskipan okkara.

Hans Andrias og mangir havnarmenn við honum sóu ikki føroysku tjóðskaparrørsluna og arbeiðararørsluna sum mótsetningar. Tvørturímóti bygdu teir á tjóðskaparrørsluna og vildu verja og menna føroysku tjóðina í øllum lutum. Hans Andrias yrkti tískil eisini flaggsangin, ið sigur: »Har ið merkini veittra, veittri eisini mítt…«

Tá ið Hans Andrias var deyður, kom Petra til abba mín við einum eintaki av fyrsta sáttmálanum, sum Havnar Arbeiðsmannafelag gjørdi í 1916. Hann skuldi abbi eiga, tí hann umboðaði sosialismuna í Havn. Hans Andrias hevur sjálvur skrivað hann við síni føgru skrift.

Men tað vóru jú ikki bara føroysku sosialistarnir í Havn, sum bygdu á tjóðskaparhugsanina. Danskir sosialdemokratar eru sanniliga tjóðskaparsinnaðir og tað í so stóran mun, at teir gera seg inn á onnur fólkasløg. Eisini vóru íslendskir javnaðarmenn heitir talsmenn fyri, at íslendska tjóðin skuldi taka við valdinum í landinum og seinni taka av kongsvaldið. Íslendska tjóðskaparkenslan hevur tó ongantíð gjørt seg inn á aðrar tjóðir – sum tann danska.

Við at seta donsku tjóðskaparhugsjónina fremst forðar javnaðarflokkurin fyri, at vinstrivongur í føroyskum politikki sleppur fram at valdinum. Einasta realistiska vinstrasamgonga er ein samgonga millum javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin, men so leingi javnaðarflokkurin blokkerar, verður tjóðveldisflokkurin noyddur at arbeiða saman við høgraflokkum.

Tað er eingin ivi um, at ein vinstravend samgonga er tað einasta rætta í Føroyum í hesum tíðum, men orsøkin til at hon ikki kemur upp á tal, og at hon er so fjart frá veruleikanum sum ongantíð áður, er júst tann flokkur, sum talar mest um arbeiðararørslu og tey veiku í samfelagnum.

Triðja tvørsøgnin hjá Javnaðarflokkinum er, at teir hava ikki álit á teirri fjøld, sum teir siga seg umboða, og sum teir biðja velja seg. Tann hugsan, at nakrir fáir høvuðkambar í einum politiskum flokki einsamallir skulu tala fyri fjøldina og krevja fullkomið lýdni og undirgeving frá arbeiðandi fjøldini er fyri tað fyrsta ódámlig – men hon hevur heldur einki við ta sosialismu at gera, sum abbi mín segði mær frá, og sum hevði so fræg umboð sum Andreu Árting, Maurentius Viðstein, Rasmus á Háskúlanum, Hans Andrias Djurhuus, Kristin í Geil og Djóna í Geil.

---

Tað er stuttligt at fáast við tvørsagnir og royna at greina tær, tí tær avdúka altíð onkran sannleika. Soleiðis eisini í hesum føri. Tí:

Føroya Javnaðarflokkur er prinsippielt fyri fólkaræði, men bara ikki tá ið skaðar kongaliga danska sosialdemokratíið.

Føroya Javnaðarflokkur hevur prinsippielt einki ímóti tjóðini – uttan tá ið hon setir seg upp ímóti kongaliga danska sosialdemokratínum.

Føroya Javnaðarflokkur vil fegin hava eina sosialistiska samgongu í Føroyum – men ikki um hon hevjar seg upp um kongaliga danska sosialdemokratíið.

Skal føroyska samfelagið gerast eitt lívført nútíðarsamfelag – og tað verður so undir øllum umstøðum - hevur javnaðarflokkurin tvinnar kostir í at velja. Antin verður hann ímóti - ella við til at fremja tað. Stóri spurningurin er tí, um hann fer at standa við sítt bæriliga navn: Føroya Javnaðarflokkur